**Tað var heilt nógv fólk á ársmøtunum hjá Kirkjuligu Heimamissiónini, sum vórðu sett í Leguhúsinum í Nesvík fríggjakvøldið í seinastu viku. Heimamissiónin hátíðarhelt 100 ára dagin í Føroyum**

ÁRSMØTI
*Edvard Joensen*



*Ársmøtini hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í ár hátíðarhalda, at liðin eru 100 ár, síðan Indre Mission kom til Føroya á fyrsta sinni. Hóast Streingjakórið á Toftum ikki er so gamalt, vakti tað minni hjá mongum at hoyra kórið, tá ársmøtini vórðu sett í Nesvík fríggjakvøldið*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Nógv fólk á ársmøti

**Nesvík:** Nógv fólk hevði leitað sær til Nesvíkar, tá ársmøtini hjá Heimamissiónini vórðu sett av Leo Hans Mikkelsen í Leguhúsinum fríggjakvøldið.

Evnið á møtunum fríggjakvøldið var Heimamissiónssøgan, har farið var aftur í tiðina og litið at, hvussu gongdin hevur verið hesa øldina, Heimamissiónin hevur verið í Føroyum.

Sverri Steinhólm, prestur, talaði á møtinum, eins og eisini varð hugt aftur á søguna við einum leiki, sum vísti eitt sindur frá hvussu ymsar bygdir tóku í móti missiónsfólkunum, tá tey fóru at halda møtir kring landið.

Streingjakórið á Toftum mundi røra manga tilkomna sál, ið minnist aftur á kvøðuljómarnar í Útvarpinum í sekstiárunum og seinni. Eisini Ungdómskórið í Vágum sang fyri teimum heilt mongu, sum komin vóru til Nesvíkar.

Tað var skilligt, at fólk høvdu í huganum, at ársmøtini í ár vóru nakað serligt, nú ein øld er liðin, síðan fyrsta missiónsmøtið varð hildið í Vági av danska prestinum Axel Moe.

Hóast hetta var um heystið, hevur Kirkjuliga Heimamissiónin valt at hátíðarhalda dagin nú, ársmøtini eru, tí nú savnast mest fólk. Men hátíðarhaldið verður alt ár kortini við ymsum tiltøkum gjøgnum árið. Og saktans fer okkurt at verða gjørt suðuri í Vági í heyst eisini, væntar aðalskrivarin hjá Heimamissiónini, Vagn Foldbo.

## Fyrireiking

Sum við øllum øðrum stórum tiltøkum krevur tað eisini væl av fyrireiking at standa fyri einum slíkum tiltaki, sum væntandi fer at savna í túsundvís av fólki.

Heimamissiónin hevur ongan limalista at fara ígjøgnum, tá heitast skal á fólk um at taka eina hond í. Talan er ikki um ein felagsskap, men eina rørslu, har fólk sjálvboðin halda seg til, tá soleiðis er. Og ikki bilar, hvørki at fáa fólk at manna køkin ella at standa fyri legum ella øðrum tiltøkum, Heimamissiónin stendur fyri.

Kortini er sjálvur dagligi raksturin skipaður í fastar karmar við løntum fólkum. Ikki fær enn 17 starvsfólk eru í dag fast knýtt at Kirkjuligu heimamissiónini, greiðir Vagn Foldbo frá. Og tá verður ikki roknað við teimum, sum arbeiða á sjómansheimunum, sum Heimamsissiónin í grundini eisini stendur aftanfyri.

Tá ársmøtini vórðu sett í Nesvík fríggjakvøldið, høvdu tey væntað, at eini 200 fólk ella so, mundu fara at koma, søgdu tey í Nesvík. Men tá avtornaði vóru tey heldur umleið 500. So har gjørdist so mikið fult, at øll rúmtust ikki í stóra salinum. Latið varð upp, mestsum »út á geilar«, og fólk sat so í forhøllini eisini og lýddi á.

## Næstan sum í oyðimørkini

Tey vórðu mestsum tikin á bóli í køkinum í Leguhúsinum í Nesvík fríggjakvøldið, tí tað kom so nógv meira fólk, enn tey høvdu roknað við. Tey noyddust at borðreiða til væl fleiri, enn tey høvdu gjørt klárt til.

Hóast tey ikki beinleiðis høvdu nakran á staðnum, sum fekk hvørt breyðið at røkka til túsund mans í part, varð kortini eingin, sum einki fekk í munnin, tá fyrstu møtini vóru liðug fríggjakvøldið.

Seks fólk vóru tey í køkinum, og tey høvdu væntað einar 200 gestir, men tað rakk ikki. Har komu eini 500 fólk til Nesvíkar hetta kvøldið.

So var bara at gera meira til, og tað gekk eisini. Eitt sindur strævið, men lagið var gott kortini.

Tey fyrstu, sum komu til Nesvíkar fríggjakvøldið, fingu nátturða. Seinni um kvøldið var kaffi til øll, sum komin vóru.

Tey flestu fóru heim aftur um kvøldið, men onkur varð verandi. Tey skulu so hava morgunmat leygarmorgun. Og seinni skal bæði døgurði og millummáli gerast til øll, sum koma á ársmøti.

So í køkinum í Leguhúsinum gekk tað við fullari ferð. Lagið var gott, og mestsum alt riggaði, sum tað skuldi, hjá teimum, hóast okkurt avlopsrør undir einum vaski hevði hug at arga eitt sindur.

– Soleiðis er tað altíð, tá mest er brúk fyri tí, er standard viðmerkingin, tá soleiðis er.



*Nógv fólk hittist til slíkar samkomur sum ármøti. Jákup Kass, fyrrverandi prestur, sum eisini er fyrrverandi stýrisformaður í Kirkjuligu Heimamissiónini, var í Nesvík fríggjakvøldið, og hann hevði mong at heilsa uppá*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Hóast húsið fyltist, varð kortini ikki neyðugt at seta hol á takið, sum onkuntíð varð gjørt, fyri at sleppa fram at tí góða orðinum*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Skipaeftirlitið ov tíðliga á veg um óhappið hjá Norrønu

**Partarnir í málinum um Norrønu eru ikki lidnir at gera viðmerkingar og tí mátti Skipaeftirlitið enn einaferð bíða við at almannakunngera niðurstøðuna um óhappið hjá Norrønu**

ÓHAPPIÐ HJÁ NORRØNU
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skipaeftirlitið hevur einar tvær ferðir ásett dagin fyri, nær frágreiðingin um áhappið hjá Norrønu skuldi almannakunngerast. Men báðu ferðina mátti fráboðanin takast aftur*

Tað var eitt mistak, tá ið Skipaeftirlitið hósdagin ætlaði at almannakunngera frágreiðingina um óhappið hjá Norrønu.

Tí mátti Skipaeftirlitið enn einaferð boðað frá, at tað mátti bíða við at almannakunngera frágreiðingina um óhappið hjá Norrønu.

Partarnir, sum eru uppi í málinum, eru nevniliga ikki lidnir at gera viðmerkingar til málið og tí mátti at enn einaferð útsetast at almannakunngera frágreiðingina.

Fyrrenn partshoyringarnar eru lidnar, ber ikki til at almannakunngera frágreiðingina.

Bjørn á Heygum, sakførari hjá skiparanum á Norrønu, váttar, at partshoyringarnar ikki eru lidnar enn.

Hann sigur, at hildið verður fram við partshoyringunum hesa vikuna, so at vit kunnu koma ígjøgnum hoyringsprocessina, sum hann málber seg.

Hon er nevniliga ikki liðug enn, segði sakførarin við Sosialin fríggjadagin.

Hann vil annars ongar viðmerkingar gera til málið so leingi, tað er í viðgerð.

Hann vil sostatt heldur ikki siga sína hugsa um, antin Skipaeftirlitið hevur gjørt eitt fyrisitingarligt mistak við at kunngera, at frágreiðingin skuldi almannakunngerast hósdagin, hóast partshoyringarnar ikki vóru lidnar.

Tað fekst ongin viðmerking frá Skipaeftirlitinum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Rak langa leið til Sumbiar

FLØSKUPOSTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jacob Poulsen í Sumba við fløskuni og brævinum, hann fann í mølini nú ein dagin. Fløskuposturin kemur heilt úr Kanada*

Tað er ikki heilt ókent at finna fløskupostar ymsastaðni í Føroyum. Men tað er ikki ofta, at fløskupostar reka so langt sum tann hevur rikið, ið Jacob Poulsen í Sumba fann hendan dagin.

Hann plagar javnan at gera sær ein túr undir Bakkanum í Sumba. Men ein góðveðursdag herfyri, fann hann ein reka, sum vakti forvitni. Hann fann eina fløsku við vælklistraðum proppi á og tá ið hann hugdi nærri, sá hann, at eitthvørt lá í fløskuni.

Talan var um ein fløskupost.

Og hesin fløskuposturin hevur rikið longri á havinum enn teir flestu.

Í brævinum, sum lá í fløskuni, stendur, at fløskuposturin er tveittur á sjógv av skipinum, Northern Ranger uttanfyri Labrador í Kanada í oktober í fjør.

Hetta hálva árið, fløskuposturin hevur verið í sjónum, hevur hann sostatt rikið einar 3.000 kilometrar á havinum, suður um Grønland og Ísland og síðani eystur í hav, líka til Føroya, har hann endaði sínar dagar undir Bakkanum í Sumba.

So vítt, vit hava fingið upplýst, er Northern Ranger eitt slag av strandfaraskipi í Labrador ið siglur við fólki og farmi ímillum ymisk pláss har á leiðini.

## Dovnir næmingar ella læruríkt skúlaár?

Hetta eru spurningar, sum skúlastýrini í Tòrshavnar Kommunu seta sær, nú tey leggja upp til kjak um 10.floks upplivingina. Skúlastýrini bjóða inn til kjakfund mikukvøldið 28.apríl klokkan 19:00 í Lærara-skúlahøllini, og evnið verður tað, sum fyri mong er síðsta árið í fólkaskúlanum, nevniliga 10.flokkur. Kjakast skal millum annað um spurningin hvørt 10. flokkurin er ein nyttuleys tíð fyri skúlatroyttar ungdómar, ella um talan kanska er um eitt avbjóðandi ár, ið fyrireikar tey ungu til størri ábyrgd. Tað verða í stóran mun næmingarnir sjálvir, sum fara at stýra fundinum við eini frágreiðing um kanning, sum næmingarnir hava gjørt um sínar floksfelagar. Endamálið við fundinum er at stimbra eitt kjak um skúlaskipanina og føroyskan skúlaskap.

**hkm**

## Íslendingar syngja fyri føroyingum

Fyrsta dagin í mai hava íslendingar kórkonsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tað er kallakórið Ernir, sum kemur til Føroyar á vitjan. Teir fara saman við Tórshavnar Manskóri og Fuglafjarðarkóri at framføra leygardagin tann fyrsta mai klokkan átta um kvøldið í Mentanarhúsinum.

**hkm**



## Gera pláss til virki sum ikki kann vera ímillum fólk

**Tvøroyrar Býráð hevur samtykt at broyta byggisamtyktina fyri at gera pláss fyri einum serstøkum virki**

TVØROYRI
*Áki Berholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyrar Kommuna hevur fingið fyrispurning frá vinnurekandi, sum ætla at seta eitt virki á stovn í komununi.

Men tað serstaka við hesum virki er, at tað kann ikki vera ov nær bygdum øki.

Á býráðsfundi á Tvøroyri herfyri, varð málið umrøtt og har varð skotið upp at broyta byggisamtyktina, so at virkið kundi byggjast úti í óbygdum.

Upplýstvarð ikki, hvat virki, talan var um, men tað er til so stóran ampa fyri fólk, at tað má liggja uttanfyri bygt øki.

Men uppskot koma fram um at broyta byggisamtyktina fyri Ásdal, so at virkið kundi byggjast har.

Ásdalur er lagt av til fíøki, men býráðið samtykti at broyta ein part av tí, til Havna og vinnuøki.

Einasti býráðslmur, sum ikki tók undir við hesum var Dan Nielsen. Hann helt seg var ov illa kunnaðan til at taka støðu. Hann vísti á, at Trongisvágsfjørður var víðførur og hann skilti ikki, hví virki ikki kundi vera onkra aðrastaðni kring fjørðin uttan akkurát har eitt fríøki var frammanundan.

Tí mælti hann býráðnum til at vísa á okkurt annað øki.